13. novembur 2019

# Ársfrágreiðing hjá skúlastýrinum 2019

Kunning um skúlastýrið:

Sitandi skúlastýri eru hesi:
Vegna skúlan Høgni Warberg (skrivari) og Turid G. Hansen, lærari
Vegna kommununa Vivi Davidsen og Ragnar Isaksen
Vegna foreldur/børn Marjun Danielsen, Sigrun Helga Magnusson og Nelly Haakonardóttir Debes
Um tit ynskja at vita meira um skúlastýri sum heild, liggur hetta á heimasíðuni hjá mentamálaráðnum
https://www.ummr.fo/fo/arbeidsoki/utbugving-og-gransking/folkaskulin/skulastyri/

Skúlastýrið hevur eftirlit við virksemi skúlans, umframt at tað hevur ábyrgdina av, at m.a. meginreglur verða gjørdar, og skúlastýrið skal ummæla øll mál viðvíkjandi skúlanum, sum kommunustýrið tekur avgerð um
Um foreldur/verjar ynskja at fáa mál tikin upp í skúlastýrinum, kann hetta gerast skrivligt til ein okkara.
Fundir hjá skúlastýrinum 2019:

| | |
|---|---|
| 06/03-2019 | Eftirmett matpakkin.fo og mjólkaskipanina |
| 01/05-2019 | Status viðv. ískoytinum um hjúnaskilnað og status viðv. ábøtum á fimleikarhøllina |
| 12/06-2019 | Skipa fyri garðdagi, eftirmeta tilboð uppá uppvørpu, lørift og ljóðanlegg. Tosa um felagsforeldrafund í november |
| 26/06-2019 | Garðdagur |
| 11/09-2019 | Fíggjarætlanin løgd fram, og Sunrit velur at taka farloyvi í 1 ár |
| 09/10-2019 | Fund saman við Vestmanna skúlastýrið, tosa um samstarv viðvíkjandi undirvísingartilfari, sum brúkt er. Um uttanlandsferðir. Kvívíkar Skúli hevur avgjørt, at skúlin fer ikki á setursskúla ella námsferð uttanlands. Tosa um samstarv ímillum flokkarnar, so tey koma at kennast betri. |
| 13/11-2019 | Felags Foreldrafundur, har Elin Michelsen hevur framløgu um skermnýtslu |

Allar fundarfrágreiðingarnar liggja á heimasíðuni hjá skúlanum; www.kvivikarskuli.fo

13. novembur 2019

Tað sum skúlastýri, hevur arbeitt við hetta árið eru hesi mál:

- -bussskipanin til og frá Vestmanna skúla
    - Trupulleikar vóru við skipanini í skúlaárinum 2018/2019, men hetta sær ikki út til at vera ein trupulleiki í ár. Vestmanna skúli roynir at leggja tímarnar, so at teir passa við bussin. Men Kvívíkar kommuna hevur funnið fram eina aðra loysn við at fáa skúlabuss. Henge koyrir
- Garðdagur
    - Garðdagurin í ár riggaði sera væl. Nógv foreldur og børn nýttu dagin saman, og í tráð við góða siðvenju, er tað spæliliðið í 7. flokki, sum skipar fyri spølunum.
- Nútímansgera útgerðina í amfiteatrinum í gongini
    - Ætlanin er at seta ljóðanlegg og uppvørpu upp
- Ískoyti til tilbúgvingarætlanina viðvíkjandi hjúnarskilnaði
    - Her er gongd í arbeiðnum. Í verandi løtu bíða vit at hoyra aftur frá heilsusystir og lærarum. Vónandi kemur gongd á hetta málið aftur.
- Fimleikahøll
    - Kommunan hevur sett pening av til ábøtur til fimleikahøllina.
    - Vónandi kann hetta vera gjørt skjótt.

Vegna skúlastýrið

Nelly Haakonardóttir Debes
Skúlastýrisforkvinna